## Einki kaffi

Leiðslan á stóru donsku skipasmiðjuni Lindø hevur fingið at vita frá eigarunum, at skal virksemið á skipasmiðjuni halda fram, skal hvør einasta arbeiðsløta nýtast til fulnar. Millum mannað hevur leiðslan tí sagt starvsfólkinum, at í framtíðini skulu tey møta til ásetta tíð, og tað er einki, sum eitur at drekka kaffi í arbeiðstíðini. Tey, sum ikki leggjast sjúk, fáa eina eyka samsýning. Tað er A.P. Møller-Mærsk, sum eigur Lindøskipasmiðjuna.

## Bingjur í ánna

Myndugleikarnir í Týsklandi noyddust í morgun at steðga allari skipaferðslu eftir Rhinen-ánni. Orsøkin er eitt óhapp, har tað 105 metrar langa farmaskipið "Excelsior" misti 31 bingjur í ánna nærhendis býnum Køln. 14 av teimum 31 bingjunum fóru til botns, og í morgin skulu stórir kranar royna at fáa tær uppaftur. Sera nógv skip sigla eftir Rhinen hvønn dag, og í morgun lógu 100 skip og bíðaðu eftir at sleppa fram við Køln.

# Ung í Føroyum Eystur í Runavík

**Nú er tann sera væleydnaða stevnan Ung í Føroyum Eystur í Runavík av. Teir 24 stevnuluttakarnir millum 13 og 17 ár eru farnir heim eina fantastiska uppliving ríkari. Tey arbeiddu miðvíst og konsentrera báðar dagarnir og sást hetta eisini á teimum einastandandi góðu framførslunum.**

TÍÐINDASKRIV

Jamie Boylan byrjaði dansiverksmiðjuna við upphiting og rørsluserium (frasum), ið gav luttakarunum innlit í contemporary dans, ið er hansara sergrein. Arbeitt var út frá einum brotið í einum indianskum sagni úr Norðuramerika. Søgan er um eina mús, ið byrjaði við at vera so trongskygd, at hon bara sá sítt, men við hjálp av gávum frá teimum djórum hon møtti á vegnum, lærdi hon at síggja so víða sum ein ørn.

Ongin tónleikur varð nýttur til dansin, rørslurnar skuldu siga alla søguna. Hetta var heilt øðrvísi enn dansararnir áður høvdu roynt. Arbeitt var í størri og smærri bólkum, har m.a. tosa var um, hvussu rørslurnar skuldu gerast til hesi ymsu brotini í søgugongdini. Eisini fingu tey ymisk amboð, ið tey kunnu nýta framyvir í dansi, til samstarv og dansivenjingar. Til opnar verksmiðjur leygardagin vóru luttakarnir klárir at sýna fram søguna um músina. Eins og hon høvdu tey fingið eina gávu, ið lærdi tey at síggja víðari fram á leiðini.

Í tónleikaverksmiðjuni hjá Dánjal á Neystabø varð byrjað við at "fanga" løg. Hetta hevur eisini indianararøtur. Hildið verður, at man ikki smíðar løg, men finnur tey við at lurta nóg væl eftir. Við at lurta "fangaðu" luttakararnir " hvør sítt tema, sum tey so fingu amboð til at arbeiða víðari við til eitt liðugt lag.

Verksmiðjan endaði við, at allir átta tónleikararnir høvdu samansjóða eitt lag, ið hevði fýra tema við sjálvgjørdari útseting og teksti. Eftir bert ein dag, varð so eitt lag skapt, ið bæði varð framført og upptikið.

Tey flestu á myndaverksmiðjuni hjá Oggi Lamhauge høvdu myndir við til framsýningina tað fyrsta kvøldið. Á stevnuni varð so ein stór felagsframsýning skapt. Evni var likamslutir, ið ikki vanliga eru goymdir av klæðum, so sum hendur, føtur, andlit o.a. Hetta varð teknað, málað og stoypt í gips og sett saman til kompositiónir á svørtum plátum. So hvørt sum leið út á dagin, kom tað at umfata ymiskt annað, ið eisini sást, so sum fruktirnar, ið eisini fingu eina gipsavstoyping, og WCkumman, ið varð nýtt sum myndevni í tekningunum.

Til framsýningina vóru allar tær svørtu pláturnar settar saman til eitt stórt listaverk, ið breiddi seg út úr hølinum og oman eftir gongini. Umframt hálvgum óhugnaligar gipskompositiónir av hálvum fingrum og tómum fótum vóru tekningar, málningar og eitt par av cowboybuksum við grafitti.



Myndlistaframsýningin verður at síggja á ovaru hædd í kommunuskrivstovuni í Runavíkar Kommunu komandi vikuna.

Tá stevnan endaði kom Kári P. Højgaard vegna Runavíkar Kommunu og takkaði fyriskiparunum fyri, at teir høvdu valt kommununa til Ung í Føroyum Eystur. Hann bað tey ungu taka tað við sær, ið tey her høvdu fingið høvið at uppliva og minnast til at trúgva á seg sjálvi, seta sær mál í lívinum og fylgja teimum.

Komandi vikuskifti fer Ung í Føroyum stevnuróðin fyri fyrstu ferð til Vágs, har Ung í Føroyum Suður verður í Pakkhúsinum.

Meiri verður at lesa og síggja á heimasíðuni hjá Ung í Føroyum www.ungiforoyum.info



# Kvinnuhúsfelagið hevur havt aðalfund

**Kvinnuhúsfelagið hevur havt aðalfund, og í tí sambandi eftirlýsa tær úrslitið av arbeiðsbólkinum um ráðgevandi toymi um kvinnur. Almanna- og Heilsumálaráðið setti bólkin, men enn hevur onki spurt burturúr.**

KVINNUHÚSIÐ
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Kvinnuhúsfelagið hevði aðalfund 15. mars 2007. Í nevndini í felagnum sita Eyrith Leyni, forkvinna, Masa Christiansen, næstforkvinna, Ása Olsen, kassameistari, Sigrun Samuelsen og Daisy Sloan. Í nevndini fyri Kvinnuhúsgrunnin sita Fríða Patursson, forkvinna. Brynhild Danielsen og Annetta Saltá.

### Eftirlýsing

Aðalfundurin endaði við, at limirnir samtyktu at koma við áheitan til játtandi myndugleikar:

Kvinnuhúsfelagið hevur nú virkað í 18 ár og royndirnar eru, at samfelagsbroytingarnar ikki altíð eru til gagns fyri kvinnur og børn, serliga ikki tá ið talan er um einligar mammur.

Kvinnuhúsfelagið hevur væntað at sæð álit um ráðgevandi toymi til kvinnur til tess at bøta um livikor og útbúgvingarmøguleikar hjá einligum mammum.

Kvinnuhúsfelagið er vitandi um, at Almanna- og Heilsumálaráðið hevur sett arbeiðsbólk at arbeiða við málinum, og at arbeiðið skuldi vera liðugt í mars mánaða í ár. Enn er einki ítøkiligt komið burturúr, okkum vitandi vegna tvørrandi játtan til samsýning av forkvinnuni og samskiparanum.

Aðalfundurin hjá Kvinnuhúsfelagnum samtykti at heita á landsstýrismannin í Almanna- og heilsumálum um at bera so í bandi, at finna loysnir, so at arbeiðsbólkurin kann halda fram við arbeiðinum um at seta Kvinnuráðgeving á stovn.

# Landsstýrið viðger harðskap

**Fyrrapartin í morgum varð málið um grova álopið á ein ungan mann í Havnini í vikuskiftinum umrøtt á landsstýrisfundi í Tinganesi**

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Álopið á unga mannin um vikuskiftið, sum eftir øllum at døma var rasistiskt motiverað, hevur nú verið uppi á landsstýrisfundi í Tinganesi.

- Eitt slíkt álop, sum eftir øllum líkindum er rasistiskt motiverað, er andstyggiligt og tað vekir djúpa skomm, at slíkt yvirhøvur kemur fyri í landi okkara. Her mugu myndugleikar, politikarar, foreldur, skúli – ja, hvør og ein okkara gera sítt til, at slíkt ikki fær loyvi at henda, sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, í tíðindaskrivi.

Løgmannskrivstovan boðar frá, at Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum, nú fer at seta seg í samband við løgregluna fyri at vita, hvat løgreglan og politiski myndugleikin í felag kunnu gera til tess at fyribyrgja rasismu og harðskapi millum ung.

Harafturat fer Landsstýrið nú í vár undir sonevndu SSP-verkætlanina, sum er eitt samstarv millum sosiala-, skúla- og politi-myndugleikan, og millum annað hevur til endamáls at leggja upp fyri slíkum harðskapi. Fyrsti SSP-fundur verður 11. mai.